**UTTAN ÚR HEIMI**

# Stuðla teimum palestinsku sjálvmorðsbumbumonnunum

**Tann størsti muslimski felagsskapurin í Indonesia tekur fult undir við atsóknunum hjá teimum palestinsku sjálvmorðsbumbumonnunum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Ein talsmaður fyri indonesiska felagsskapin Nahdlatul Ulama segði í gjár, at felagsskapurin stuðlar av fullum huga teimum palestinsku sjálvmorðsbumbumonnunum, sum hava søkt at ísraelskum málum.

Boðskapurin varð kunngjørdur á ársfundinum hjá felagsskapinum, sum sambært indonesisku myndugleikunum umboðar umleið 40 milliónir indonesar.

- Islam bannar sjálvmorði, er orsøkin ikki nóg góð, og sjálvmorðsbumbur er avgjørt tann seinasta loysnin. Men tá um ræður at berjast fyri sannleikanum ella átrúnaðarligum sjónarmiðum, kann tað góðtakast, stóð í boðunum hjá muslimska felagsskapinum.

Indonesisku myndugleikarnir siga, at víðgongdir muslimskir felagsskapir í landinum hava ofta tikið undir við teimum palestinsku sjálvmorðsbumbumonnunum, men hetta er fyrstu ferð, at ein hóvligur felagsskapur sum Nahdlatul Ulama hevur tikið somu støðu.

Næstan 85 prosent av teimum 210 milliónunum, sum búgva í Indonesia, eru muslimar.

# Aftur eitt tokóhapp í USA

**Í minsta lagi 90 fólk fingu skaða, tá eitt ferðamannatok fór av jarnbreytini norðan fyri Washington mánadagin**

SAMFERÐSLA
*Árni Joensen*

Óhappið hendi við Kensington, sum er einar 20 kilometrar norðan fyri Washington.

202 fólk vóru í tokinum, sum var á veg úr Washington til Chicago, tá tveir av vognunum loysnaðu og fóru út av jarnbreytini og oman millum nøkur trø. Hinir vognarnir koppaðu á breytini, men tey bæði lokomotivini vórðu standandi.

Bjargingarmyndugleikarnir siga, at tað var eitt undur, at eingin lat lív. Umleið 90 fólk máttu flytast á sjúkrahús til viðgerðar, og sambært læknunum vóru seks teirra illa meidd.

Hví vognarnir fóru útav, vita myndugleikarnir ikki.

Óhappið við Kensington er tað fjórða tokóhappið í USA seinastu fýra mánaðarnar. Tann 18. apríl doyðu fýra fólk, og meiri enn 200 fingu skaða, tá eitt tok fór av breytini í Florida.

Fimm dagar seinni doyðu tvey fólk, tá eitt ferðamannatok og eitt góðstok stoyttu saman nærhendis Los Angeles. 265 fólk fingu skaða.

Tann 14. mai fingu tvey fólk skaða, tá eitt tok rendi á ein lastbil í Suður Karolina og fór út av breytini.



*Bjargingarmenn kanna jarnbreytina, har tokið úr Washington til Chicago fór útav. Meiri enn 90 fólk fingu skaða*

*Mynd: Reuters*

# Clinton ilskast inn á Bush

**Tað er ikki vanligt, at fyrrverandi amerikanskir forsetar finnast at virkandi forsetanum, men nú er Bill Clinton troyttur av George W. Bush og umsiting hansara**

USA
*Árni Joensen*

Tað, sum hevur fingið øði í Bill Clinton, er, at stjórnarumsitingin hjá George W. Bush roynir at geva fyrrverandi forsetanum skyldina av teimum álvarssomu fíggjargølunum, sum eru komnar undan kavi í USA í seinastuni.

Bush hevur fleiri ferðir róð uppundir, at tað var í forsetatíðini hjá Clinton, at amerikansku fyritøkurnar fóru at svika við roknskapinum, og at fyrrverandi forsetin og stjórn hansara gjørdu ikki nóg mikið fyri at steðga óskilinum.

Hetta hevur eftir øllum at døma fingið øði í Bill Clinton.

- Vinnulívið breyt lóggávuna, áðrenn Bush tók við, og tað helt fram, eftir at hann hevði tikið við. Veruleikin er, at eg royndi at gera nakað við trupulleikan, men at flokkur forsetans, republikanararnir, forðaði tí, segði Clinton í einari sjónvarpssamrøðu sunnudagin.

Fyrrverandi forsetin legði afturat, at ein av teimum republikansku politikarunum, sum forðaðu ætlaðu lógarbroytingunum, fekk starvið sum leiðari í kreditteftirlitinum, eftir at Bush hevði tikið við.

Bill Clinton ilskast eisini um, at Bush-stjórnin hevur hug at geva honum skyldina av støðuni í Miðeystri. Teir vilja vera við, at tann miseydnaða semingsroyndin hjá Clinton á heysti í 2000 elvdi til harðskapin millum ísraelsmenn og palestinar.

- Í sjey ár eydnaðist tað okkum at halda viðurskiftunum í Miðeystri á beinari kós, og nú royna teir at geva mær skyldina av viðurskiftunum í dag, segði Clinton í sjónvarpssamrøðuni sunnudagin.

Hvítu Húsini hava ikki gjørt nakra beinleiðis viðmerking til tað, sum Bill Clinton hevur sagt. Scott Stanzel, talsmaður sigur, at tað er ikki siður at finnast at undanmonnum ella eftirmonnum í amerikanska forsetaembætinum, og at Bush hevur valt at hyggja frameftir.



# Ólavsøku í fagrasta veðri

**Báðir ólavsøkudagarnir eydnaðust sera væl við veðri, og tað sást aftur í Havnar gøtum, har nógv fólk í góðum lag var at síggja bæði dag og nátt**




*Skrúðgonga við ítróttarfólki setti sum vanligt dám á setanina av ólavsøkuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÓLAVSØKA
*Eyðun Klakstein*

Í fjør var veðrið á ólavsøku nakað av tí vánaligasta, sum tað ber til at fáa á miðum summari. Í ár vent í holuni, og sólin bakaði tey mongu fólkini, sum leitaðu sær út á Havnargøtur um vikuskiftið.

Tá ólavsøkan varð sett ólavsøkuaftan var veðrið gott, og tað helt sær allan dagin. Men var veðrið gott sunnudagin, so var tað enn betri ólavsøkudag, tá sólin bakaði dagin á tamb.

Fólk vóru í góðum lag, og tað bar rættiliga til at vísa tey føroysku klæðini fram. Onnur gingu hálvílætin og puffaðu, meðan sólbrillurnar á nøsini hildu ringastu sólskinið burtur frá eygunum.

Góða veðrið gjørdi, at nógv fólk var í býnum bæði dag og nátt, og tey flestu mundu ásannað, at tað er langt ímillum, at ólavsøkuveðrið roynist so væl, sum tað gjørdist hesaferð.



*Sunnudagin gingu politikarar, prestar og embætisfólk skrúðgongu. Hesa løtuna var spenningur millum fólk um, hvussu tað fór at vera við samgonguni*

*Mynd: Finnur Justinussen*



*Eisini børnini dugdu at hugna sær í góða veðrinum*

*Mynd: Finnur Justinussen*



*Stóra ólavsøkukórið sang undir tinghúsinum*

*Mynd: Finnur Justinussen*